Sjúkrasystrar á B 6 halda fast um at tær rýma á nýggjárinum

Á fundinum hóskvøldið hendi onki, sum kundi fáa tær 19 sjúkrasystrarnar á B 6 á Landssjúkrahúsinum at taka uppsagnirnar aftur.

Uppsagnirnar á B 6 standa við. Svartiper kann bara enda einastaðni, hjá sjúklingunum

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
Áki Bertholdsen

Uppsagnirnar hjá teimum 19 sjúkrasystrunum á B 6 á Landssjúkrahúsinum standa við.

Sostatt er tað eisini greitt, at tann stóri semingsfundurin, sum var á Hotel Hafnia hóskvøldið endaði úrslitaleysur.

Sjúkrasystrarnar á B 6 hava sagt upp tí at tær siga, at tær eru ov illa mannaðar til tað arbeiðsbyrðu sum áliggur teimum og avgjørda treytin frá teimum fyri at taka uppsagnirnar aftur, er, at fleiri starvsfólk verða sett.

Men hesum vil leiðslan á Landssjúkrahúsinum ikki ganga á møti, tí hon sigur, at B 6 er líka væl mannað sum tilsvarandi deildir á einum donskum sjúkrahúsi. Sjúkrasystrarnar hava svarað aftur, at ongin deild á donskum sjúkrahúsum kann samanberast við B 6, tí her liggja nógvir røktarsjúklingar og onnur, sum ikki eiga at vera á sjúkrahúsi, men á øðrum stovnum og at hetta eru fólk, sum krevja ómetaliga nógva røkt.

Men leiðslan er ikki til at vika. Ein orsøk til at hon ikki vil geva seg, er, at hon vil ikki boygna fyri trýsti og hon stúrir fyri, at verða fleiri fólk sett á B 6 eftir slíkum trýsti frá sjúkrasystrunum, fer hetta at breiða seg sum eldur til aðrar deildir eisini og so kann leiðslan skjótt missa tamarhaldið á støðuni.

Í eini seinastu roynd at finna semju í málinum, skipaði leiðslan á Landssjúkrahúsinum fyri semingsfundi á Hotel Hafnia hóskvøldið.

Við sær hevði hon ikki eitt tilboð um fleiri starvsfólk. Afturfyri hevði hon ein sálarfrøðing við sær í vónini um, at hann fekk slættað sjógvarnar.

Førdi hesin fundurin ikki til nakað, skuldi lýsast eftir nýggjum sjúkrasystrum til B 6 í dag.

Fundurin førdi ikki til nakað og Ingun Gaardbo, álitisfólk á B 6 sigur, at tískil standa uppsagnirnar við, Hon hevur ikki stórvegis viðmerkingar til sjálvan fundin uttan tað, at har hendi onki, sum gekk teimum á møti.

Sjúklingar illa fyri

Uppsagnirnar á B 6 verða eitt álvarsligt bakkast fyri sjúklingarnar.

Tað eru ikki nógvar sjúkrasystrar at taka av í Føroyum, og somuleiðis er eisini ovurhonds stórt trot á sjúkrasystrum í grannalondum okkara.

Keldur, vit hava tosað við, siga, at tískil er tað sera trupult at ímynda sær, hvaðani landssjúkrahúsið skal fáa 19 nýggjar sjúkrasystrar til B 6.

Harafturat kemur, at sjúkrasystrar á øðrum deildum hava longu nú gjørt púra greitt, at tær fara ikki at góðtaka, at tær skulu fáa økta arbeiðsbyrðu av at B 6 leitur aftur á nýggjárinum. Tvs, at tær góðtaka ikki, at tær fáa sjúklingar á B 6 afturat teimum, tær longu hava.

Og at enda kann nevnast, at Sjúkrasystrafelagið hevur boðað frá, at tað fer at heita á allar limir sínar um at vísa samhaldsfesti við starvsfelagar sínar á B 6 og at lata vera við at søkja størvini.

– Tískil er tað bara ein bólkur, sum kann standa eftir við svartaperi og tað eru sjúklingarnir, siga keldur okkara í Heilsuverkinum.

Akkurát, hvat hetta fer at merkja, er ilt at meta um, men tær sjúklingar, sum hava tær sjúkur, har B 6 hevur servitanina, verða nógv verri fyri. Somuleiðis er ongin ivi um, at bíðitíðin til ymsar viðgerðir, fer at økjast munandi.

Nògvir sjúklingar á B 6 hava lívsneyðugan tørv á viðgerð og tískil mugu teir viðgerðast á øðrum deildum, men tað merkir so bara, at teir sjúklingar, sum skuldu fáa viðgerð á hesum deildunum, attan at hava bráðneyðugan tørv, verða skumpaðir afturum.

Nú má byggjast av nýggjum

Mánadagin fer leiðslan á Landssjúkrashúsinum at byggja upp eina nýggja B 6- deild á Landssjúkrahúsinum. Hvussu hon fer at síggja út, veit røktarfakligi stjórin ikki enn

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
Áki Bertholdsen

Marin Vang, røktarfakligur stjóri á Landssjúkrahúsinum

Nú má byggjast av nýggjum og tað arbeiðið byrjar longu manadagin.

Eisini Marin Vang, røktarfakligi stjórin á Landssjúkrahúsinum ásannar, og at semingsfundurin hóskvøldið við sjúkrasystrarnar á B 6 var úrslitaleysur.

Hon sigur, at leiðslan hevði arbeiðssálarfrøðing við sær fyri at royna at vita, um tey ikki kundu semjast um onkur felags áhugamál, eitt nú at stýra sjúklingatilgongdina, røktartilgongdini ella til at fáa starvsfólkatalið at samsvara við arbeiðstyngdina, og fyri at avdúka, hvar tað gongur galið.
Men hon heldur ikki, at tað eydnaðist nakað serligt.

Sjúkrasystrarnar høvdu fingið freist til kl. 10 í gjáramorgunin at boða frá, um tær tóku uppsagnirnar aftur. Tað høvdu tær ikki gjørt kl. 9 58 og aðrastaðni í blaðnum, sigur álitisfólki á B 6, Ingun Gaardbo, at tað fara tær ikki at gera.

Gera nýggja deild

Verður tað úrslitið, fer leiðslan á landssjúkrahúsinum longu mánadagin undir arbeiðið at endurreisa B 6.

– Talan verður um eitt nýtt projekt, at B 6 skal byggjast uppaftur við tí endamálið at fáa eina vælvirkandi deild, sigur Marin Vang.

Samstundis vórðu lysingar eftir nýggjum starvsfólki sendar út í gjár.

Hvussu deildin fer at síggja út, ella, hvussu hon verður mannað, vil hon onki siga um enn.

– Men sjálvandi vilja vit hava dugnaligar sjúkrasystrar eisini, sigur hon.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum stendur annars fast við, at B 6 er líka væl mannað, sum líknandi deildir í Norðurlondum.

– Tað eru væl ongar deildir, sum líkjast akkurát. Men sambært formanninum fyri leiðandi sjúkrasystrar í Danmark er starvsfólkatalið á B 6 miðalhøgt samanborið við líknandi deildir aðrastaðni.

– Men á medisinskum deildum runt um, eru 50-60 % av sjúklingunum tungir, røktarkrevjandi sjúklingar og tað er meiri enn á B 6, ella í hvussu so er ikki minni.

Marin Vang sigur, tó, at hetta skal takast við varsemi, tí ongar nágreiniligar mátingar eru gjørdar og deildirnar líkjast ikki akkurát, tó at heiliráðsdeildir hava nøkur felags eyðkennir og í miðal er arbeiðsbyrðan á B 6 helst ikki størri enn aðrastaðni.

Nólsoyar kommuna vil hava fleiri at seta búgv:

Útstykkja grundøkir undir Brekkuni

Bygdaráðsformaðurin heldur tað vera rætti vegurin at ganga at veita fólki góðar umstøður at seta búgv í Nólsoy, tí bygdin liggur so tætt uppat meginøkinum, har nógv dýrari er at fáa tak yvir høvdið.- Vit vilja hava fleiri barnafamiljur út her at búgva, so uppaftur størri nytta verður í teimum tænastum, vit veita borgarunum við eitt nú skúla og barnaansing, sigur Jógvan Thomsen

BYGDATÍÐINDI
Vilmund Jacobsen

Nólsoy: Ein lutfalsliga stór ætlan, sum Nólsoyar kommuna arbeiðir við, er ein útstykking og byggibúning av 8-9 grundøkjum undir Brekkuni har eysturi í bygdini.

Jógvan Thomsen sigur, at bygdaráðið skal hava eina viðgerð av hesum málinum aftrat, áðrenn tað er endaliga í "pottinum".

Hann vísir á, at fólkatalið í Nólsoy, sum í dag er 265, aftur er í vøkstri og barnatalið somuleiðis. Í Nólsoyar skúla ganga eini 37 børn.

Fleiri børn,bíligari ansing

- Barnaansingin í kommununi er ein rættiliga tungur postur í mun til barnatalið í skipanini, sum liggur millum 12 og 15.

Jógvan vísir á, at skipanin kostar 1,066 milj. krónur netto um árið, og tá er skjótt at rokna út, hvat hvørt barnið kostar.

- Hevði barnatalið verið størri, var prísurin fyri hvørt barnið eisini lægri, sigur hann.

Bygdaráðsformaðurin heldur tað vera rætti vegurin at ganga at veita fólki góðar umstøður at seta búgv í Nólsoy, tí bygdin liggur so tætt uppat meginøkinum, har nógv dýrari er at fáa tak yvir høvdið.

- Vit vilja hava fleiri barnafamiljur út her at búgva, so uppaftur størri nytta verður í teimum tænastum, vit veita við eitt nú skúla og barnaansing.

Og at hetta so aftur gevur nakrar eyka skattakrónur í kommunukassan, man ivaleyst telja við í metingini hjá Jógvani!

Barnagarður, eldrasambýli og Steffanstova

Nólsoyar kommuna hevur eisini sett av eitt øki beint eystanfyri skúlan til tað, teir kalla "onnur endamál".

– Vit hava ikki lagt okkum fastar á, hvat alt hetta økið skal brúkast til, men hugsast kann, at her einaferð verður ein barnagarður og møguliga eitt eldrasambýli.

Jógvan vísir á, at Emil Thomsen arbeiðir við eini "Steffanstovu", sum ætlandi verður eitt savn eftir kenda listamálaran, Steffan Danielsen.

– Spyrst okkurt burtur úr hesi ætlanini, hevur kommunan nevnda økið at vísa á, sigur hann.

Sum skilst, er ætlanin, at listafólk skulu hava høvið at koma út til Nólsoyar at mála og annars hava framsýningar í "Steffanstovu".

Kommunan væl fyri

Jógvan Thomsen sigur annars, at kommunan er rímiliga væl fyri fíggjarliga.

– Vit eiga 1,4 milj. krónur á bók, og kassakredittur er trektur til umleið 650.000 krónur. So, ognin hjá kommununi er einar 750.000 krónur.Spurdur, hvussu stóra íløgukvotu, kommunan hevur fyri komandi ár, sigur bygdarráðsformaðurin, at honum kunnugt eru útoyggjarnar undantiknar teirri umtalaðu íløgukvotuni. Ístaðin eru tær generellu ásetingarnar í kommunustýrislógini galdandi. Hesar siga, at kommunan ikki skal skylda meira enn eina álíkning, sum er umleið 4 milj. krónur.

– "Brendu" vit alt av í einum, kundu vit gjørt íløgur fyri nakrar milj. krónur. Men hetta hevði sett síni spor, tí tað hevði økt nógv um rentu-og avdráttarbyrðuna.

At enda sigur bygdarráðsformaðurin, at Nólsoyar kommuna vil sita væl í tí.

– Hetta prioritera vit rættiliga høgt, sigur hann.

Grindafundur í Klaksvík

Grindamannafelagið skipar fyri kunningarfundum um grind. Tann fyrsti verður í Ósáskúlanum í Klaksvík mánakvøldið kl 19:30

GRIND
Eirikur Lindenskov

Mánakvøldið skipar Grindmannafelagið fyri fundi í Klaksvík. Fundurin verður kl 19:30 í Ósáskúlanum.

– Á fundinum fer Justinus Olsen, djóralækni, at tosa um avlíving av hvali v. m., og Dorethe Bloch fer at tosa um metingar og kanningar, sigur Ólavur Sjúrðarberg, sum er formaður í Grindamannafelagnum.

Hann sigur, at á fundinum verður eisini tosað um grindareglugerðina og um onnur lokal mál.

Ætlanin hjá Grindamannafelagnum er í vetur at halda slíkar fundir eisini í Eysturoynni og í Norðurstreymoy. Ólavur Sjúrðarberg sigur, at Grindamannafelagið er eitt nokk so virkið felag. Eini 1.000 fólk eru limir í felagnum, hvørs høvuðsendamál er at upplýsa um grind og grindadráp.

Nógv útlendsk tíðindafólk venda sær til felagið millum ár og dag, og roynir felagið eisini á tann hátt at upplýsa umheimin um grindadrápið.

Horntónleikur í Glyvra kirkju

KÓRKONSERT
Tíðindaskriv

Leygarkvøldið 8. desember hava Nes sóknar Musikkfelag og Havnar ungdomshornorkestur felags konsert í Glyvra kirkju. Leiðari hjá báðum orkestrunum er musikklærarin Ken Jones.

Í Havnar Ungdómshornorkestri eru 17 spælarar, sum allir eru næmingar hjá Ken. Orkestrið er sostatt sett saman av sera ungum spælarum, sum tó ikki eru óroyndir. Tey hava m. a. verið bæði í Noregi og í Aberdeen og spælt. Tey fyrireika eina ferð til París í summar, so sigast má, at hesir ungu blásarar fáa altjóða royndir.

Nes sóknar Musikkfelag er sett saman av spælarum úr bygdunum kring Skálafjørðin. Har eru bæði ungir og eldri spælarar, frá 11 – 71 ár, og tilsamans eru tey 25. Orkestrið spælir regluliga til mong ymisk tiltøk: stevnur, hátíðarhald, konsertir og tendring av jólatrøum. Nes sóknar musikkfelag var í 1999 á konsertferð í Skotlandi.

Á konsertini fara orkestrini fyrst at spæla hvør sína skrá við jólatónleiki, og endað verður við at felagsorkestur, sum tá telur yvir 40 spælarar, spælir 2 løg.

Konsertin í Glyvra kirkju verður leygarkvøldið 8. desembur kl. 19.